## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útnyrðingi, seinnapartin minkar hann vindin niður í lot av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann veksur vindin aftur upp í skrið av útnyrðingi, men seinnapartin minkar hann vindin niður í stívt andøvsgul. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 4 og 8 stig.



*Langabbin Jógvan, 60 ár, omman Eyðbritt, 39 ár, mamman Gurið, 20 ár, oldurabbin Elias, 84, olduromma Emma, 80 ár, og lítli beiggi, sum er ein mánað*



*Langomman Maria, 57 ár, omman Eyðbritt, 39 ár, mamman Gurið, 20 ár, oldurromman Eina, 81 ár og lítli beiggi, sum er ein mánað*

# Fimm ættarlið í báðar ættir

**Tað hendir seg meira enn so, at ein sær fimm ættarlið í eini familju, men fimm ættarlið í báðar ættir er heldur sjáldsamari sjón**

ÆTTARLIÐ
*Dagfinn Olsen*

Tað kemur meira enn so fyri, at ein sær fimm ættarlið í eini familju savnast. Men fimm ættarlið í báðar ættir er óivað heldur sjáldsamari sjón.

Men í Vági letur hetta seg gera og mikukvøldið tóku vit hesar myndirnar.

Myndirnar omanfyri er tiknar í Vági mikukvøldið við 84 ára føðingardagin hjá oldurabbanum Eliasi. Høvið var at taka familjumyndir og so var gjørt. Dagurin var hildin í Eldrasambýlinum í Vági, sum enn er nýtt og eisini sera snotuligt hús, har til ber at búgva í smærri eindum, tá aldurin er farin at tyngja og húsini kanska eru nakað rúmlig og tung at halda.

Sosialurin ynskir tillukku við degnum og ynskir ættarliðunum blíðan byr.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 5 |
| Halifax | 5 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 10 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 11 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 18 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 24 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 20 |
| New York | 10 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 968 hPa við Bergen fer í útnyrðing. Eitt hátrýst, 1025 hPa yvir Grønlandi viknar.




Lágtrýstið norðan fyri Føroyar fer spakuliga í útsynning, meðan lágtrýstið vestan fyri Skotland fer móti Suður-Noreg.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 23/10 kl. 06⁰⁰– 24/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,5°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,5 mm – mált frá 23/10 kl. 06⁰⁰– 24/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 45,4 mm


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

20. okt.: Mánin longst frá jørðini
21. okt.: Fullmáni
29. okt.: Seinna kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. okt. | 10.02 | 22.24 | 09.02 | 21.24 | 09.17 | 21.39 | — | 12.02 | 00.40 | 13.02 | 08.17 | 20.39 | 07.17 | 19.39 | 10.17 | 22.39 | 11.17 | 23.39 | 09.47 | 22.09 | 11.02 | 23.24 |
| 26. okt. | 10.47 | 23.11 | 09.47 | 22.11 | 10.02 | 22.26 | 00.24 | 12.47 | 01.24 | 13.47 | 09.02 | 21.26 | 08.02 | 20.26 | 11.02 | 23.26 | — | 12.02 | 10.32 | 22.56 | 11.47 | — |
| 27. okt. | 10.36 | 23.01 | 09.36 | 22.01 | 09.51 | 22.16 | 01.11 | 12.36 | 02.11 | 13.36 | 08.51 | 21.16 | 07.51 | 20.16 | 10.51 | 23.16 | 00.26 | — | 10.21 | 22.46 | 00.11 | — |
| 27. okt. | – vetrartíð | | | | | | | | | | | | | | | | 11.51 | | | | 11.36 | |
| 28. okt. | 11.27 | — | 10.27 | 23.07 | 10.42 | 23.22 | 01.01 | 13.27 | 02.01 | 14.27 | 09.42 | 22.22 | 08.42 | 21.22 | 11.42 | — | 00.16 | 12.42 | 11.12 | 23.52 | 00.01 | 12.27 |

Kelda. Álmanakkin 2002

5 707265 100050 >